## Somalia fær ikki hermenn úr Etiopia

Etiopiska stjórnin hevur havnað einari áheitan um at senda hermenn til grannalandið Somalia. Tað var somaliska fyribilsstjórnin, sum bað um at fáa hermenninar. Fleiri túsund etiopiskir hermenn komu til Somalia í 2006, men teir fóru haðani fyrst í hesum árinum. Nú vil fyribilsstjórnin hava hermenninar at koma aftur at hjálpa somaliska stjórnarherinum í bardaganum við islamskar uppreistrarmenn. Bardagarnir hava verið serliga harðir í høvuðsstaðnum Mogadishu, síðani ein av ráðharrunum í stjórnini varð skotin seinasta fríggjadag. Meiri enn 4.000 friðarvarðveitandi hermenn hjá Afrikanska Eindarfelagsskapinum eru í Mogadishu, men teir hava ikki heimild til at leggja seg út í bardagarnar, skrivar AP.



## 30 ára fongsul fyri hópmorð

Callixte Kalimanzira, sum var innanríkisráðharri í afrikanska landinum Rwanda, er dømdur 30 ára fongsul sum samsekur í fólkamorðinum í Rwanda í 1999, tá umleið 800.000 fólk vórðu myrd eftir 100 døgum. Kalimansiravar var ákærdur fyri at hava savnað fleiri túsund fólk av tutsi-ættarbólkinum og at hava givið teimum lyfti um vernd og mat. Men hann sveik lyftið, og øll vórðu myrd. Tann serligi dómstólurin, sum viðger fólkadrápið í Rwanda, hevur nú felt dóm í 38 málum. Seks fólk eru fríkend, men øll hini 32 hava fingið dóm, skrivar AFP.

# Vænta eitt gott ár í ár

**Fiskiskapurin eftir gulllaksi higartil í ár man hava verið ein hin besti, sum menn vita um at siga**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur gingið sera væl hjá leirvíkstrolarunum, Polarhavi og Stjørnuni, at fiska gulllaks higartil í vertíðini í ár.

Skipini hava fiskað út við 3.000 tons av gulllaksi, síðan tey fóru undir hesa vertíðina í apríl í ár. Fiskurin er lagdur upp í Saltangará og er virkaður á Tavuni í Leirvík.

Hjá Sjóborg í Leirvík siga tey, at gongst restina av hesi vertíðini, sum tað hevur gingið higartil, er ikki óhugsandi, at skipini koma at fiska meira enn 5.000 tons av gulllaksi í ár.

- Útlit eru til, at hetta verður besta árið í nøgd hjá okkara skipum, síðan gulllaksaveiðan byrjaði í 1990/1991 við gomlu skipunum, sum tá vóru nýggj, siga tey hjá Sjóborg í Leirvík.

Ein stórur partur av gulllaksaframleiðsluni verður seldur í Noregi, og nú norska krónan er lág, er prísurin fyri ráfiskin og lidnu vøruna kanska ikki so góðum, sum hann kundi verið, um hesi viðurskifti vóru øðrvísi.

- Men hetta er eitt sera gott íkast hjá okkara skipum, og henda veiða, sum tilsamans seks av okkara frægastu partrolarum eru um, sparir eisini upsastovnin í hesi vertíðini.

Gulllaksaprísurin, sum skipini hava fingið í hesi vertíðini, er 3,25 krónur fyri kilo.



*Stjørnan og Polarhav hava longu í hesi gulllaksavertíðini lagt nógvar lastir upp í Saltangará. – Vit vænta, at hetta árið fer at roynast sum tað besta, siga tey hjá Sjóborg í Leirvík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*Leirvíkingar hava nú saman við øðrum lagt lunnar undir fleiri nýggj føroysk arbeiðspláss í supply-vinnuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Nú vit um stutta tíð fara í gongd eftir tógvið stríð gjøgnum langa tíð, eru tað mong, sum eiga stór tøkk uppiborna fyri, at vit nú eru komin so langt. Hetta geldir fólk bæði á landi og sjógvi, sum á ymiskan hátt hava verið við til at gjørt verkætlanina møguliga, sigur hann.

### Góðar treytir – hørð krøv

Eldborg, sum hevur 800 fermetrar av deksplássi, hevur sonevnt "clean design" sum merkir, at øll atlit til umhvørvi eru tikin, ið eru møgulig við einum dieselriknum skipi.

Jens Meinhard Rasmussen, stjóri í Supply Service, sigur, at eitt nú er Co2-útlátið lítið í mun til onnur líknandi skip, og dupulti skrokkurin veitir tryggleika.

Tummas Justinussen er saman við hinum eigarunum sera væl nøgdur við, at tað hevur eydnast felagnum at tryggja skipinum eina fýra ára langan sáttmála.

- So drúgvir sáttmálar eru óvanligir, og ikki minst, tá vánaliga búskaparliga støðan í heiminum verður havd í huga, eru vit sera væl nøgdir, leggur hann aftrat.

Sáttmálin fyri Eldborg er gjørdur við samtakið, ið er samansett av Det Norske Olieselskap, Vinterhoalls og Oddfjell Drilling.

- Treytirnar í sáttmálanum eru góðar, men afturfyri eru krøvini hørð, sigur Tummas Justinussen.



*- Vit hava arbeitt við hesi verkætlan í átta ár, og tað hevur verið ógvuliga stríggið at fingið allar góðkenningar, sum skulu til fyri luttøku í hesum partinum av supply-vinnuni, sigur Tummas Justinussen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*